Vegleiðing til kunngerð um landbúnaðarstuðul
Landbúnaðarstuðulin er savnaður undir løgtingslóg um landbúnaðarstuðul, og í tí sambandi er nýggj kunngerð um landbúnaðarstuðul gjørd. Í hesi vegleiðing verður greitt frá, hvussu stuðulin er skipaður.

Landbúnaðarstuðulin er bundin av játtanini, sum er ásett í løgtingsfíggjarlógini í 2026. Hetta merkir, at sjálvt um tað í kunngerðini er nevnt eitt ávíst krónutal, sum kann latast í stuðli til ávísa framleiðslu, so er upphæddin einans eitt ovasta mark fyri, hvussu nógvur stuðul kann verða latin. Endaligi stuðulin er tí treytaður av játtanini á fíggjarlógini, eins og hann er treytaður av talinum á umsøkjarum.

Stuðulsjáttanin, sum kemur frá Búnaðargrunninum, verður í 2026 latin til gróði, fóður, flogfenað, egg og landbúnaðarverkætlanir. Hesin stuðulin verður býttur eftir lutfallinum millum samlaðu mongdina av virðinum á øllum teimum játtaðu umsóknunum og verður síðani býttur út samsvarandi.

Tað merkir, at um t.d. 60% av samlaða virðinum á játtaðu umsóknunum, eru umsóknir um stuðul til gróði, so verða 60% av samlaðu upphæddini frá Búnaðargrunninum býtt millum játtaðu umsóknirnar um stuðul til gróði. Sama er galdandi, tá stuðulin til gróði skal býtast millum ymsu sløgini av gróði.

Mjólk
Stuðulin til mjólk er játtanarbundin og verður einans latin til mjólk, sum kann flokkast sum mjólk í fyrsta flokki. Játtanin er tann sama sum í 2025 og verður latin mjólkavirki, sum tekur ímóti mjólk.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til mjólk, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Avloysaraskipan
Stuðulin til avloysaraskipan fyri mjólkabøndur er játtanarbundin og verður latin sum stuðul fyri hvønn litur av mjólk í fyrsta flokki, sum verður latin mjólkarvirki. Játtanin er tann sama sum undanfarin ár og verður býtt lutfalsliga millum tey, sum hava latið mjólk til mjólkavirki og fingið vátta stuðul fyri mjólkina.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til avloysara, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Seyðakjøt
Stuðul verður veittur sum stuðul fyri hvørt kilo av feskum kjøti, sum er selt og váttað. Játtanin er tann sama sum undanfarin ár og verður latin lutfalsliga millum tær játtaðu umsóknirnar.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til seyðakjøt, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Góðingakálvar og neytakjøt

Gøðingarkálvar
Stuðulin fyri gøðingarkálvar er í mesta lagi 2.500 kr. fyri hvønn kálv og verður latin, tá kálvurin er ávikavist 12 mánaðir og 24 mánaðir gamal, soleiðis: Í mesta lagi 1.500 kr., tá kálvurin er 12 mánaðir gamal, og í mesta lagi aðrar 1.000 kr., tá kálvurin er 24 mánaðir gamal. Verður ein gøðingarkálvur slátraður, áðrenn hann er 24 mánaðir gamal, er stuðulin fyri at gøða kálvin til matna í mesta lagi 1.500 kr.

Umsókn um stuðul eftir hesi áseting er ikki treytað av, at umsøkjarin er mvg-skrásettur og hevur ein umsetning oman fyri 50.000 kr. Hinvegin verður kravt, at Búnaðarstovan fær prógv og váttanir um einstaka kálvin, sum stuðul verður søktur til.

Neytakjøt
Stuðul verður veittur, sum stuðul fyri hvørt kilo av feskum kjøti, sum er selt og váttað. Hetta merkir, at tann, sum fær stuðul til at gøða kálvar til matna, eisini kann fáa ein stuðul fyri tað selda (kálva)kjøtið.

Stuðul til ávikavist neytakjøt og gøðingarkálvar verða játtaðir av somu játtan og verða býttir út eftir lutfallinum ímillum umsóknir um stuðul at gøða kálvar til matna og stuðul til neytakjøt.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til neytakjøt, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Flogfenaður
Talan er um nýggjan stuðul, sum verður latin fyri at ala og selja flogfenað til matna. Stuðulin verður latin av teirri stuðulsjáttan, sum kemur frá Búnaðargrunninum og sum sambært § 6 í kunngerðini verður latin til grøði, fóður, flogfenað, egg og landbúnaðarverkætlanir.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til at ala og selja flogfenað til matna, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Egg
Talan er um nýggjan stuðul, sum verður latin fyri at framleiða og selja egg til matna. Stuðulin verður latin av teirri stuðulsjáttan, sum kemur frá Búnaðargrunninum og sum sambært § 6 í kunngerðini verður latin til grøði, fóður, flogfenað, egg og landbúnaðarverkætlanir.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til at framleiða og selja egg til matna, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Grøði
Talan er um nýggjan stuðul, sum verður latin fyri at framleiða og selja grøði til matna. Stuðulin verður latin av teirri stuðulsjáttan, sum kemur frá Búnaðargrunninum og sum sambært § 6 í kunngerðini verður latin til grøði, fóður, flogfenað, egg og landbúnaðarverkætlanir.

Stuðulin til grøði verður latin fyri hvørt kilo ella hvørja eind av tí grøði, sum verður nevnd í kunngerðini um landbúnaðarstuðul.

Orsøkin til at onkur grøði fær stuðul fyri hvørt kilo, meðan onnur grøði fær stuðul fyri hvørja eind, er tann, at tað vegna vav og slag av grøði vanliga verður gjørt upp í annaðhvørt kiloum ella eindum, tá tað verður selt.

Kryddurtir eru tó í eini serstøðu, tá tað í kunngerðini verður víst á ein stuðul fyri hvørja eind, tí kryddurtir eru í vavi og slagi serstakar. Tí verður ein eind av kryddurtum fatað sum ein samla mongd av kryddurtum, sum vanliga verður seld sum ein samlað eind, t.d. ein eind upp á 100 ella 200 gr.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til at framleiða grøði til matna, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Oyðiløgd grøði
Stuðul kann eisini vera latin teimum, sum kunnu prógva, at grøði, sum skuldi framleiðast til matna, er oyðiløgd av náttúruávum ella av øðrum serligum ávum. Hetta kann vera grøði, sum er oyðiløgd av villgæs, ella um óvanligt veður hevur oyðilagt grøðina. Umsókn um stuðul til mista grøði er treytað av, at umsøkjarin kann prógva, at grøðin, heilt ella partvíst, er mist, av náttúruávum ella øðrum serstøkum ávum, eins og metast skal um virði á mistu grøðini. Stuðulin er tann sami, sum hevði verið latin fyri sølu av grøðini.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til grøði, ið er oyðiløgd, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Fóður
Stuðul verður latin til stráfóður og annað djórafóður. Stuðulin verður latin fyri hvørja fóðureind, sum er seld og váttað. Er talan um framleiðslu til egið brúk er nóg mikið, at fóðrið verður váttað.

Búnaðarstovan letur stuðulin eftir eini ítøkiligari meting av veruliga fóðurvirðinum á tí fóðrinum, sum stuðul verður søktur til. Búnaðarstovan ger stakroyndir av fóðrinum, verður tað mett neyðugt.

Skjal 1 í kunngerð um landbúnaðarstuðul er vegleiðandi fyri, hvat vanliga fóðurvirðið er á teimum í skjalinum nevndu sløgunum av fóðri. Hetta merkir tó ikki, at Búnaðarstovan treytaleyst fylgir talvuni í skjalinum. Eitt ítøkiligt dømi er, at súrhoyggj kann hava bæði eitt hægri og lægri fóðurvirðið enn tað, sum stendur í talvuni.

Stuðulin, sum er tann sami, sum undanfarin ár, er játtanarbundin og er í mesta lagi 2,6 kr. fyri hvørja fóðureind. Stuðulin verður býttur lutfalsliga millum allar játtaðar stuðulsumsóknir.

Umsøkjari, sum søkir um stuðul til framleiðslu og sølu av fóðri, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.. Hetta er eisini galdandi fyri tann, sum søkir um stuðul til fóður til egið brúk.

Føroysk húsdjór
Føroysk ross

Søkjast kann um stuðul til aliryssur og greðingar, sum verða brúkt at ala føroysk ross. Umsókn um stuðul eftir hesi áseting er ikki treytað av, at umsøkjarin er mvg-skrásettur og hevur ein umsetning oman fyri 50.000 kr. Umsøkjarin skal tó sjálvur eiga rossið, sum stuðul verður søktur til.
Í 2026 er stuðulin 10.000 kr. fyri hvønn greðing og 8.000 kr. fyri hvørja ryssu.

Føroyskar gæs
Søkjast kann um stuðul til gæs, sum verða brúktar at ala føroysku gásina. Stuðulin er í mesta lagi 100 kr. fyri hvønn alifugl. Umsókn um stuðul eftir hesi áseting er ikki treytað av, at umsøkjarin er mvg-skrásettur og hevur ein umsetning oman fyri 50.000 kr. Umsøkjarin skal tó sjálvur eiga gæsnar, sum stuðul verður søktur til.

Føroyskar dunnur
Søkjast kann um stuðul til dunnur, sum verða brúktar at ala ta føroysku dunnuna. Stuðulin er í mesta lagi 80 kr. fyri hvørt djór. Umsókn um stuðul eftir hesi áseting er ikki treytað av, at umsøkjarin er mvg-skrásettur og hevur ein umsetning oman fyri 50.000 kr. Umsøkjarin skal tó sjálvur eiga dunnurnar, sum stuðul verður søktur til.

Ull og skinn
Skinn
Tey, sum hagreiða og selja seyðaskinn, kunnu søkja um stuðul til útreiðslurnar til djóralæknakanningar og -váttanir, og stuðulin kann tí ikki vera hægri enn hesar útreiðslur.
Umsókn um stuðul eftir hesi áseting er ikki treytað av, at umsøkjarin er mvg-skrásettur og hevur ein umsetning oman fyri 50.000 kr.

Ull
Eingin stuðul verður latin til ull. Búnaðarstovan bjóðar sær tó til at keypa ull í fyrsta og øðrum flokki.

Búnaðarstovan flokkar ullina soleiðis:

Ullin skal vera turr og nosslig og stungin í reinar posar. Tikið verður ikki ímóti vátari ull.

Ull við skræpu ella málingarrestum í, pesjur (fleirárað ull), ull við ov nógvum mosa, bosi ella eyri í, og ull við fremmandalikamum í (t.d. restir av bótum, tráði o.tíl.) verður vrakað.

Ullin verður býtt sundur í tveir góðskuflokkar: 1. flokk og 2. flokk.

Tøvd ull, hálsull o.tíl. verður avroknað í 2. flokki. Somuleiðis verður ull við nakað av mosa o. líkn. avroknað í II. flokki.

Annar stuðul
Stuðul kann eftir umsókn latast aðrari landbúnaðarframleiðslu og landbúnaðarverkætlanum. Stuðulin er treytaður av, at játtan er tøk, eins og stuðulin er treytaður av talinum á umsøkjarum.

Tann, sum søkir um stuðul til aðra landbúnaðarframleiðslu ella landbúnaðarverkætlanir, skal vera mvg-skrásettur og hava ein umsetning oman fyri 50.000 kr.